

# Anfinn Kallsberg 55 ár

Í gjár, 19. november, fylti Anfinn Kallsberg, løgmaður, 55 ár.

Anfinn er ættaður úr Klaksvík, sonur Gunnar og Katrinu Kallsberg. Hann er giftur við Berghild, sum er dóttir Sigrid og Hans Jákup Matras á Viðareiði.

Løgmaður hevur handilsútbúgving, og hann hevur fyrr starvast hjá J. F. Kjølbro, tað var frá 1964 til 74. Hann var bókhaldari frá 1968-74, og síðani juli 1974 hevur hann havt sjálvstøðugt bókhaldsvirki.

Anfinn Kallsberg varð valdur á ting í 1980. Hetta var tá gamli formaður Fólkafloksins, Hákun Djurhuus, ikki stillaði uppaftur, og Fólkaflokkurin mátti hava onkran at lyfta arvin, tí Hákun hevði røkt Norðoya valdømi fyri Fólkaflokkin síðani 1946.

Tað má sigast, at Anfinn Kallsberg rættuliga fekk fótin fastan í Norðoya valdømi, tí hann er afturvaldur fimm ferðir siðani 1980, og hevur hann sitið ósvikaliga tryggur í sessinum – og fleiri ferðir hevur hann fingið mann valdan afturat sær.

Anfinn Kallsberg hevur fleiri ferðir verið landsstýrismaður, fyrstu ferð í 1983, tá hann tók við sætinum, tá Olaf Olsen legði frá sær í landsstýrinum hjá Paula Ellefsen. Tá umsat Anfinn fiskivinnu- og handilsmál. Hann tók viðaftur í 1989 – eisini tá Olaf Olsen legði frá sær, hesaferð fekk hann fiskivinnuna at umsita. Hendan samgongan fekk kortini ikki so langt lív lagað, tí val varð skrivað út at verða 17. november 1990. Tá vann Javnaðarflokkurin valið, og skipaðu Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin ta fyrstu tvíflokkasamgonguna síðani 1954. Anfinn Kallsberg gjørdist tá løgtingsformaður.

Tá Javnaðarflokkurin í 1996 segði seg úr samgonguni hjá Edmundi Joensen, vóru aftur boð eftir Fólkaflokkinum. Tá fekk Anfinn Kallsberg aftur sæti í Tinganesi sum fíggjarmálaráðharri, hóast fleiri tá høvdu roknað við, at Edmund Joensen fór at skriva út nýval. Taktikari er Anfinn, tað má sigast, tí hann hevur sitið ósvikaliga tryggur í Tinganesi síðani – seinastu hálvtfimta árið sum løgmaður.

Anfinn Kallsberg gjørdist formaður Fólkafloksins, tá Jógvan Sundstein legði frá sær í 1994. Hann er triði løgmaður úr Fólkaflokkinum og tann av teimum, sum hevur sitið longst. Hinir vóru Hákun Djurhuus (1963-67) og Jógvan Sundstein (1989-91).

Av politiskum álitisstørvum annars kunnu vit nevna, at hann hevur verið limur í Norðurlandaráðnum og í stýrinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús. Hann var eisini bygdarráðsformaður á Viðareiði frá 1974-1980

# Poul Nyrup Rasmussen leggur frá sær

**Eftir at hava leitt flokkin í fleiri enn 10 ár og verið forsætisráðharri í fleiri enn níggju ár, leggur Poul Nyrup Rasmussen nú frá sær sum formaður í danska Javnaðarflokkinum. Ókoyringarnar hava verið nógvar, og fyri fyrstu ferð síðaini 1924 misti flokkurin støðuna sum størsti flokkur í Danmark**



*Nógvar ákoyringar hava verið móti Poul Nyrup Rasmussen síðani flokkurin tapti valið í fjør. Hetta er fyrstu ferð síðani 1924, at Javnaðarflokkurin ikki er størsti flokkur í Fólkatinginum*

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

Í gjár tók Poul Nyrup Rasmussen øll á bóli, tá hann boðaði frá, at hann fer at leggja frá sær sum formaður í danska Javnaðarflokkinum.

Tað er sum ein avleiðing av tapinum á seinasta fólkatingsvali og eftir støðugt trýst seiansta árið, at hann nú fer frá sum formaður.

Hetta váttar Jan Petersen, sum er næstformaður Javnaðarfloksins á Fólkatingi.

– Hetta er ein kensluborin og harður dagur, tí tað er ikki á hvørjum degi, vit skifta formann, sigur Jan Petersen í stuttari viðmerking í Danmarks Radio.

Danski Javnaðarflokkurin hevði starvsnevndarfund í gjár, har gjørt varð av at kalla inn til eykalandsfund, sum skal velja nýggjan formann.

Avgerðin hjá Nyrup kemur, eftir at hann seinastu tíðini hevur fingið nógvar ákoyringar fyri sín máta at leiða flokkin uppá. Hetta hendir eisini í kjalarvørrinum av fíggjarlógarviðgerðini.

Fleiri tingmenn hjá Javnaðarflokkinum hava dulnevndir í miðlunum gjørt var við, at eftir teirra tykki hevur flokkurin í veruleikanum ongan formann havt.

12 av 16 tingmonnum skulu hava gjørt var við, at flokkurin er í eini leiðslukreppu.

Tá Poul Nyrup Rasmussen í fjør misti stjórnarleiðsluna eftir níggju árum, merkti tað, at Javnaðarflokkurin fyri fyrstu ferð síðani 1924 ikki var størsti flokkur í Danmark.

Órógv tók seg upp í flokkinum síðsta summar, og fram til landsfundin í september fekk Nyrup nógvar árbeiðslur innanfloks.

Poul Nyrup Rsmussen mátti broyta sína ætlan at seta fleiri av sínum fólkum í leiðandi størv í flokkinum. Eftir landsfundin hevur hugburðurin í flokkinum verið, at tað bert var ein spurnngur um tíð, nær Nyrup mátti velja at leggja frá sær sum formaður.

Tá blaðið fór til prentingar hevði Poul Nyrup Rasmussen enn ongar viðmerkingar gjørt til støðuna.

### Fakta um Poul Nyrup Rasmussen

Føddur 15. juni í 1943 í Esbjerg, sonur Oluf Nyrup Rasmussen, arbeiðsmann, og Veru Nyrup Rasmussen, vaskikonu.

Studentur frá Esbjerg Statsskole 1962. Cand.polit., Lærda háskúlan í Keypmannahavn, 1971

Settur í starv sum búskaparfrøðingur í LO 1971-86, »cheføkonom« 1986-88

Næstformaður fyri danska Javnaðarflokkin 1987-92

Fólkatingsmaður fyri Ringkøbing Amtskreds frá 10. mai 1988

Forsætisráðharri frá 25. januar 1993 til 27. november 2001.

Gifutr 14. mai 1994 við Lone Dybkjær, sum er sivilverkfrøðingur

# Lykketoft helst nýggjur formaður



*Mogens Lykketoft er tann fyrsti, sum hevur boðað frá, at hann stillar upp sum nýggjur formaður hjá Javnaðarflokkinum*

**Mogens Lykketoft váttar, at hann stillar upp sum nýggjur formaður hjá danska Javnaðarflokkinum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

So skjótt tað frættist, at Poul Nyrup Rasmussen fer at leggja frá sær, var heitt á Mogens Lykketoft, fyrrverandi fíggjar- og uttanríkisráðharra, um at stilla upp sum nýggjur formaður.

Fyri Danmarks Radio váttar Mogens Lykketoft, at hann er biðin um at stilla upp.

– Eg eri biðin um tað, og eg stilli upp fyri at royna at savna flokkin um at taka upp stríðið við borgarligu stjórnina. Nú mugu vit so síggja, hvussu leikur fer. Landsfundur verður í næsta mánaði, og tað er sjálvsagt landsfundurin, sum skal gera av, hvør nýggi formaðurin verður, segði Mogens Lykketoft eftir starvsnevndarfundin hjá Javnaðarflokkinum á høvuðsskrivstovuni hjá Javnaðarflokkinum á Thorvaldsensvej á Frederiksberg gjáramorgunin.

Hann vísti samstundis aftur, at hann bert verður fyribilsformaður.

– Vit eru øll deyðilig, men eg havi góða heilsu, segði hann.

Hann segði eisini, at Javnaðarflokkurin ikki stendur fyri stórum politiskum broytingum við honum við róðrið.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gleddu meg á 95 ára degnum 19. oktober við blómum, gávum og til tykkum, sum komu inn á gólvið. Serlig tøkk til sangararnar og til starvsfólkið á røktarheiminum.

**Heilsan**
**Kaj Thomassen, Svínoy**



Prix Føroyar 2003:

# Fyrireikararnir boyggja seg

**Tónleikarar hava vóru stak ónøgdir, tá Prix Føroyar fyrireikararnir søgdu, at hvør tónleikari bara slapp at spæla við einum bólki. Herfyri hevði FUT fund við tónleikarar, og eftir eini áheitan frá FUT, hava fyrireikararnir nú valt at slaka eitt sindur við krøvunum**



*Sjónvarpið er, eins og allir hinir fyrireikararnir til Prix Føroyar 2003, so smátt farið at gera klárt. Millum annað er verturin til sjónvarpssendingarnar funnin, og verður hann Tróndur Vatnhamar eins og í fjør*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Ónøgdin var stór tá fyrireikararnir til Prix Føroyar 2003 gjørdu av, at hvør tónleikari bara slapp at spæla í einum bólki til kappingina hesuferð.

Grundin var einføld. Fyrireikararnir vildu ikki, at teir somu tónleikararnir møguliga komu at ganga aftur í fleiri av bólkunum í finaluni, tí á henda hátt gerst finalan alt ov keðilig.

Fyri nakað av tíð síðani hevði FUT fund við tónleikararnar, har kjakast var um reglurnar til Prix Føroyar.

Og nú eftir eina áheitan frá FUT, hava fyrireikararnir valt at slaka eitt sindur við reglunum.

– Vit vóru kanska eitt sindur ov skjótir seinast, men nú hava vit valt at gera hesa einu regluna eitt sindur um, segði Fróði Vestergaard á tíðindafundi í Norðurlandahúsinum í gjár.

– Nú sleppur hvør tónleikari at verða við í tveimum bólkum. Men tó. Um tú ert frontfigurur, so sleppur tú bara at verða tað í einum bólki og ikki í tveimum. Ongin luttakari sleppur at vera við í meira enn tveimum bólkum yvirhøvur.

### Vinningarnir

Nú er eisini vorðið greitt, hvørjir nakrir av vinningunum gerast. Vinnarin av finaluni sleppur beinleiðis í eina danska tónleikakapping, sum eitur Star Fighters. Hetta er ein kapping, sum DR2 og P3 skipa fyri.

– Føroyski vinnarin sleppur beinleiðis í finaluna í hesi kappingini, sum verður á Skanderborg Festivalen í Danmark. Tann, sum so vinnur hesa kappingina, fær millum annað ein plátusáttmála við Sony, greiðir Fróði Vestergaard frá.

Harumframt sleppa bólkar eisini til Nibe og Jelling og vinnarin sleppur í Lundgaard Studio í Keypmannahavn taka upp.

– Møguleiki er eisini fyri øðrum vinningum. Umstøðurnar eru nógv broyttar seinastu árini, og áhugin uttanlands vísir seg at vera stórur. Vit hava millum annað fingið áheitanir frá Íslandi um at møguliga senda onkran bólk yvir har, so tað kann vera, at onkur vinningur verður afturat, sigur Fróði Vestergaard.

Teir ymsu miðlarnir gera, sum vera man, nógv burturúr Prix Føroyum. Bæði Útvarpið og Sjónvarpið hava brynja seg við góðari manning til at gera tilfar frá Prix Føroyum næsta ár.

– Útvarpið fer at senda beinleiðis frá øllum undanumførunum. Hetta er ikki gjørt áður. Umstøðurnar eru broyttar nógv í ár, nú øll tey innleiðandi umførini vera í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, sigur Ove Olsen frá Útvarpi Føroya.

Edvard Nyholm Debes, ljóðprodusari, sigur, at tað, sum er serliga gott við, at øll umførini vera í Fuglafirði er, at á henda hátt nýtist teknikarunum ikki at byrja av nýggjum, hvørja ferð eitt umfar er, og hevur hetta nógv at siga.

Útvarpið fer eisini at senda beinleiðis frá finaluni saman við Sjónvarpinum, umframt, at ein livefløga verður tikin upp, har allir finalubólkarnir fáa tveir sangir við í mun til bara ein sang hvør seinastu árini. Tá hevur bara vinnandi bólkurin fingið tveir sangir á fløguna.

Eisini Sjónvarpið er farið so smátt í holt við fyrireikingarnar til Prix Føroyar, og verturin er longu komin upp á pláss. Tað verður Tróndur Vatnhamar, sum eisini var vertur í fjør.

– Sjónvarpið fer ikki at senda beinleiðis frá undanumførunum, men vit fara at hava ein samandrátt aftaná hvørt umfar, umframt eitt eyka sending, har vit taka samanum tey sjey innleiðandi umførini, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri.

Eisini verða talur og annað als ikki ein partur av live-kvøldinum í Norðurlandahúsinum tann 26. apríl 2003. Tær verða lisnar inn áðrenn, so tær kunnu klippast upp í.

Tað eru FUT, Norðurlandahúsið, Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya, sum skipa fyri Prix Føroyum 2003. Fyrsta undanumfarið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygardagin 25. januar.

